# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stórir veiðumenn práta um stórar fiskar

**Kappingin Shark Atlantic fer nú at líða móti endanum, og nú skulu so hemara-kongarnir heiðrast**

HEMARAR
*Snorri Brend*

Leygardagin kl. 15 verður forvitnisligt tiltak í Miðlahúsinum í samband við kappingina Shark Atlantic 2007.

Á tiltakinum verða vinningar handaðir teimum, ið veitt hava størstu hemararnar í ár.

Við hesa kappingina hava einir 30 mans brúkt ein stóran part av síni frítíð at fáa fatur á størsta hemaranum.

Hetta er ikki at forsmáa, tí Trygd fer nevniliga at lata 25.000 kr. til hann, ið veitt hevur størsta hemaran.

Sum støðan er nú, falla hesir pengarnir í lutin hjá Jóannes Gaard, ið higartil hevur veitt tann størsta hemaran uppá 177 kilo.

Men enn eru nakrir dagar eftir til leygardagin, so tað kundi hent at onkur størri hemari kemur undan vatnskorpuni ein av komandi døgunum.

Tann, ið eigur næststørsta hemaran fær 10.000 kr. og hann við tí triðstørsta fær 5.000 kr. frá Trygd.

Á samkomuni leygardagin fer kappingarleiðarin, Magni Blástein haraftrat at handa eitt ferðasteyp sum Føroya Banki hevur latið.

Umfram handanina av vinningum til tríggjar teir bestu veiðumenninar, verður eisini møguleiki til eitt prát um stórar fiskar.

# Tróndur Patursson í Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 2. mars kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Tróndi Patursson, listamanni, upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Tróndur Patursson er kendur fyri at hava prýtt nógvar bygningar, bæði í Føroyum og uttanlands. Eitt av teimum seinastu prýðunum er parkeringshúsið "Tróndur" í Vejle.

Verkini á framsýningini í Galerie Focus eru innanfyri spontanu listina, ið Tróndur er kendur fyri. Myndevnini eru: hav, klettar og bjørgini – tann stóra náttúran hann hevur møtt.

Opið er týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18. Framsýningin verður opin til 16. mars.

Fríggjadagin 2. mars kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Tróndi Patursson upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.



*Fríggjadagin 2. mars letur ein framsýning við verkum hjá Tróndi Patursson upp í Galerie Focus*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

sansir.fo



Nýtt pensjónsfelag

Skjótt verður betri...

Betri pensjón er nýggja pensjónsfelagið í Føroyum. Vit fara heilt einfalt at bjóða føroyingum betri pensjónir og lívstryggingar, og fara í næstum at venda okkum til fakfeløg, virki og einstaklingar runt landið.
Málið er at vera fremsta og besta pensjónsfelagið.

Tað er okkara mál, at viðskiftafólkini hava fult innlit í alt, sum fyriferst við teirra samansparing, trygging og íløgum. Tú skalt vita, hvat tú rindar fyri, hvat tú fært fyri pengarnar, og hvussu peningurin verður umsitin.

**Hygg inn á www.betri.fo og fá meira at vita.**

Betri pensjón, Postsmoga 329, Kongabrúgvin, FO-110 Tórshavn
www.betri.fo

Betri pensjón